VIÐMERKINGAR

Politikkur hevur ikki tørv á einum hugsjónarligum innráki

Agga Niclasen
attitude@niclasen.fsnet.co.uk

Til føðingardagar ymsastaðni í landinum vitnaði eg sum unglingi vaksin fólk tosa um politikk. Kanska mest um politikarar. Og soleiðis sum nøkur teirra bóru seg at, "hasir forbrendu 'bedragandi' vatnskallar, teir gera ikki annað enn at raka til sín og síni"–fyri síðani at lata júst hesum lokalpolitisku pamparum sína atkvøðu dagin eftir–er kanska einki at siga til, at tey undir valrættaraldur vilja henda lækkaðan.

Har eru eisini aðrar enn "vit eru líka klók sum tey átjan ára gomlu"-orsøkir til hví valrættaraldurin kundi farið niður. Og er tað tí, at bretski stýrisskipanarráðharrin, Lord Falconer, nakað fyri ársskiftið kundi boða frá, at hann hevði biðið valmannasamgonguna at kanna valrættaraldurin. Lord Falconer greiddi nevniliga frá, at stjórnin var stúrin um manglandi politiska luttøku millum ungdómin og helt, at ein lækkaður valrættaraldur kundi verið svarið. Harumframt nevndi hann møguleikan fyri at onkur kanst gera limur í parlamentinum sum 18-ára gamal og ikki sum nú, har tú skalt vera fyltur 21. Alt hetta verður lagt fram í størsta álvara.

So, áttu sekstan ára gamlir føroyingar fingið loyvi at atkvøtt komandi týsdag? Nei. At byrja við kunna vit siga, at eitt slíkt uppskot hevði ført til, at Føroyar ikki longur høvdu verið ímillum londini,ið royna at virðísmeta fólkaræðisligt frælsi allarmest. Kortini, um úttalilsi sum "vit skula ikki bara gera sum onnur, men verja um føroysk virði og lívslag [sic]" er tað vorðið greitt, at ikki-frælslyntu valevni Mið- og Fólkafloksins, men meira órógvandi, Sambandsfloksins, ikki leggja petti í at vera millum oddaliðini á hesum øki soleiðis sum valevnini bera á brá av at vera undarliga hálv-fasistisk í teirra barnsliga fremmandaótta–hvussu so enn hesi blaka orð sum "kristni" ella "næstrakærleiki" um seg; og er talingur sjálvandi um eitt heilt serligt slag av næstrakærleika; tað slagið,ið bert fevnir um føroyingar-Føroyar og í besta føri kristnitrúgvandi. Vit liberalt progressivu, ella, "nýmótans" menniskju, sum hesi vanmenningarligu valevni nú syrgiligani rópa okkum í tørvinum á einum grundgevandi andsvari til sjálvt málið fyri hond, spyrja jú ikki eftir at taka í nýtslu alt, sum "útlendskt" er; men undir øllum umstøðum at røða um, hví at lond–flestir føroyingar fegnir vilja vera samanbornir við–hava tikið í nýtslu politikkin um eitt nú skrásett parlag og hví at lond ætla at lækka valrættaraldurin.

Men av londum, sum hava ein lægri valrættaraldur enn 18, kunna nevnast Norðurkorea og Sudan, sum hava sett hann á 17. At íhaldssinnaðu flokkarnir í Føroyum als ikki bera eyga við teir atspýggjuligu felagsnevnarar, hesi lond og heimlandið Føroyar eru saman um, tykist fullkomiliga eyðvitað: tí meðan stalinistiska stjórnin í Norðurkorea flytur samkynd inn í fongsul at fáa neglurnar hálaðar út og "islamiska" stjórnin í Sudan hevur valt at elta niður samkynd við tí úrsliti, at tey hoppa út av einum bergi, avgjørdi tann frælslynta sjálvstýrissamgongan í Føroyum einans at taka í nýtslu tann 'humana' politikkin, har tú bara útflytur samkyndir borgarar. Men at alternativið, Sambandsflokkkurin, ikki er sørt betur–altso, líka "menniskjasligt", kom so dyggiliga til sjóndar leygarkvøldið 10. januar í útvarpssendingini "Í andgletti" hjá ÚF. Her bleiv nevniliga Sambandsflokkurin um sín, sum sendingin frá leið, pis aller-leiðara, Lisbeth L. Petersen, á undrunarvert góðan journalistiskan hátt frárændur sítt etikettu-frælslyndi so hjá øllum lurtarum at staðfesta: at Sambandsflokkurin, øvut stevnuskránni, er anti-liberalur. Og at Fólkaflokkurin ikki bert er anti-liberalur , men vamlisligur, kom so fram 48 tímar seinni. Men hvussu valevni floksins yvirhøvur hava eydnast at flokka seg sum "liberal", er nærum tragikomiskt og tekin um skelkandi trot á politologiskum innliti og fólkaligheit. Set teg bara í samband við eitthvørt muslimskt-hatandi og homofobiskt valevni hjá lista A og spyr um ein komandi "føroyskan" útlendingapolitikk, hvat tey halda um skrásett parlag fyri hinskynd ella hvussu tað, at vera liberalur, kann knýtast at einum sama skattaprosent fyri allar inntøkubólkar-politikki!

Brasil, Kuba og Nikaragua hava ásett valrættaraldurin at vera 16. Iran er eftir øllum at døma fremst í demokratisku liberaliseringini við einum valrættaraldari á 15. Rættiliga reglufast hava londini,ið fyrst lækkaðu valrættaraldurin, verið stýrd av virknum anti-demokratiskum stjórnum. Tey fyrstu londini at lækka valrættaraldurin til 18 vóru Sovjetsamveldið og Suðurafrika undir apartheid. Og eitt sindur øvut hava annars slík fyrimyndarliga liberal-demokratiskar skipanir sum Danmark og Niðurlond havt eitt valrættaraldurs-lágmark á 25.

Hvat sigur hesin forvitnisligi roynveruleiki okkum? At har er als eingin orsøk til hví lond sum Kuba og Norðurkorea ikki skula hava ein valrættaraldur á 17, 15, sjálvt 5–tað ger ongan mun við ongum demokratiskum vali. Tað vísir kortini, at har ikki er nakað neyðturviligt samband millum eina víðkan av valrættinum og fólkaræðisligt frælsi. Nú er tað ov seint, men hevði herhøvdingi Pinochet loyvt 10-ára gomlum drongjum at atkvøtt fyri honum, hevði Óli Breckmann ivaleyst bryggjað eitt samband millum tey bæði og lagt uppskot fram um at lækka valrættaraldurin í Føroyum við átta árum. Men so vil eg eisini sleppa at skjóta upp. Tí gandakallurin, David Blaine, valdi herfyri at "óundirhalda" við at vera í einum glarkassa omanfyri Tower Bridge í 48 samdøgur uttan mat og drekka. Mær vitandi er kassin enn í goymslu, so hví ikki loyva Thatcher og Breckmann at endurtaka "bragdið"? Mannamúgvurnar høvdu verið størri enn nakrantíð fyrr.

Óansæð, ein stjórn, sum lækkar valrættaraldurin bara við tveimum árum, vildi broytt hugsjónarliga smakkin hjá veljarafjøldini munandi. Hetta vildi jú svarað til knappliga at lagt eina føroyska stór-bygd aftur at føroysku veljarafjøldini; eitt fólkatal, hvørs meiningar og trúfesti eru nakað øðrvísi enn restin av veljaraskaranum. Sekstan ára gomul eru yvirhøvur uttan ábyrgd. Og hetta sigi eg á ein ikki-niðrandi hátt. Sera fá 16- ára gomul hava verið noydd at tikið ábyrgd av nøkrum sum helst ella hava eina veruliga fatan av skyldu. Næstan eingin teirra hava børn; bert ein minniluti veitir eitt beinleiðis íkast til samfelagið, fá hava eina týðiliga ímynd av hvat teirra lív fer at innihalda og bert ein támutan varhuga av politisku valmøguleikunum.

Sjálvandi, nógv av tí omanfyri er galdandi fyri nógv vaksið fólk; og vit mótmæla ikki ímóti at fullvaksin atkvøða av grunnskygdum ella fjákutum ávum: at kristnitrúgvandi atkvøða borgaraligt, tí at avvarðandi flokkar eru avmarkandi næstrakærir og frælslyntir; at sambandsfólk atkvøða fyri Heðin Mortensen fyri hansara intellektuelt avbjóðandi lesarabrøv við nýskapandi yvirskriftum sum "Farvæl fullveldi, góðan morgun Føroyar"; at tey ítróttarglaðu atkvøða fyri Fólkaflokkin við tað at Anfinn "[eg] siti við gluggan og hyggi út" Kallsberg er eitt sjálvskrivað umboð vegna ítróttin og at sjálvstýrisfólk atkvøða fyri hr. Ejdesgaard orsakað av Kára P. Højgaard. Men har er ein munur. Har eru ikki nógv vaksin,ið ikki hava ein varhuga–hvussu kámur hann enn er–av ábyrgd og hvussu politikkur hevur ávirkan á teirra lív og fer at hava tað í framtíðini. Harumframt, sjálvt endamálið fyri nakrari niðurstøðu er uppliving. Sjálvt tann mest tornæmi veljarin vil hava ein varhuga av hvussu henda stjórnin, henda samgongan, ber saman við undanfarnar samgongur.

Royndir, ella uppliving, merkir ikki endiliga, at eldri veljarin er ein betri veljari, men roynsla lærir ein veljara hvat kann og ikki kann røkkast av politikarum. Hvat høvdu vit skulað gjørt við einum 16-ára gomlum veljara hin 20. januar 2004,ið valla hevur nakað minni um nakra landsumsiting áðrenn júst fráfarnu sjálvstýrissamgongu? Svarið er at tú sigur teimum frá hvussu óføroyskur og óndur ávikavist Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin var; harav tað seinna hóast alt var–og enn er–satt. Og tað er sjálvandi eingin orsøk til hví tey ikki skula trúgva tær.

Tann mest sannlíki trupulleikin við at lækka valrættaraldurin er eitt hugsjónarligt innrák. Táið tú tosar við ungfólk, dettur tær alt fyri eitt í hug ein hugsjónarligur hugburður um hvat sum helst samfelagsmál. Nei, hetta ljóðar helst ikki sum nakað ringt, men støðutakanirnar, nógv ung krøkja seg í, lat okkum siga, umhvørvið, ein her og nú-úrmelding úr ríkisfelagssakpinum ella ikki, Irak ella fullkomilig ognarspjaðing, eru barasta ikki roynveruligar.

So, hví er tað, seinast í Bretlandi, at stjórnir umhugsa at lækka valrættaraldurin? Tær hevda, at hetta kann strekkja fólkaræðisliga luttøku, og halda–rættliga, at ein demokratisk rødd ikki eigur at vera knýtt at skattagjalding ella ogn. Men um hetta er so, íðan, hví ikki strekkja atkvøðurættin so at tey 10-ára gomlu kunna seta kross sambært teirra samvitsku? Hesi hava somuleiðis meiningar um samfelagslig mál. Hví yvirhøvur hava eitt lágmark fyri valrættaraldurin?

Enntá vandamiklari er uppskotið hjá bretsku stjórnini um at lækka valevnisaldurin at umfata tey 18-ára gomlu. At eitt slíkt uppskot nakrantíð kom niðan í løgtingið, ikki um at tala viðtikið, sigur helst eins nógv um táverandi løgtingslimir sum núverandi flokkar. Tó, tað átti helst ikki verið ein praktiskur trupulleiki, við tað at eingin andaliga rættvorðin politiskur flokkur ger av at hava 18-21 ára gomul sum valevni, um so er, at hann ætlar at vinna sessin. Heldur ikki kann ein 18-ára gamal á nýtiligan hátt vera við í einum parlamentariskum kjaki. Veruligi vandin er tó hugburðurin, at áhugamálini hjá ungum bert kann umboðast av ungum; ein hugburður, sum bert kann enda við at teirra áhugamál verða vanrøkt við tað at tey verða givin burtur til óroynd og marginal talsfólk. Í hesum føri vita tey vaksnu helst best.

Møguleikin fyri at víðka um atkvøðurættin fer alt annars eins at styrkja víðgongdu og ópraktisku røddirnar á politiska vígvøllinum, og er tað nakað, vit øll eiga at vera stúrin um. Tí við hesum lag fara fólk at argumentera fyri at tað skal gerast lógligari at stinga meg í bakið við knívi, ví tí at eg eri androgynt slúrutur, enn at stinga Óla Breckmann í bakið, av tí at hann breiðir út eitur um samkynd, muslimar og flóttafólk, ella Lassa Klein, av tí at hann er, á ja, Lasse Klein. Um løgtingslimir ætla at kalla inn eitt stórt tal av 16-18 ára gomlim veljarum sum, sambært allýsing, ikki vita, hvat teir tosa um, fer politikkur at vera fyri eini óbeinasamari broyting í einum frammanundan menningarlandskendum fólkaræði.

Sambandsfølisir uppundir valg (Floksleyst valagg)

Meinhard Jensen

Ein dagin var prominentasta sambandsfólk í landinum - Lisbeth - í Útvarpi Føroya. Hon segði seg føla, at Danmark og Føroyar og Grønland eru jevnbúrdis partar í sama ríki. Onkur vildi protestera, men tað legði Lisbeth onki í, tí hon føldi sum hon føldi.

Danskarar kunnu krevja, at vit tosa danskt í Føroyum, men vit kunnu ikki siga, at tey tosa føroyskt í Danmark.

Danskarar bestemma, at vit skulu flagga við donskum flaggi, men vit bestemma ikki, hvørjum danskarar flagga við.

Danskar fyritøkur fáa føroyingar at keypa vørur gjøgnum Danmark, men føroyingar fáa sjáldan danskarar at keypa útlendskar vørur gjøgnum okkum.

Danskarar kunnu bestemma, hvørjir útlendingar sleppa til Føroyar at búgva og ferðast, men føroyingar sleppa ikki at bestemma, hvørjir útlendingar sleppa til Danmarkar.

Føroyingar sleppa bara til Olúmpiadu undir Dannebrog, men danskarar behøvast ikki føroyskt flagg.

Danskarar kunnu seta okkum undir administratión, tá vit hava krisu, men vit kunnu ikki seta tey undir administratión.

Danskarar kunnu annullera fólkaviljan í Føroyum, men vit kunnu ikki annullera danskar fólkaatkvøður.

Føroyar eru stýrdar eftir eini heimastýrislóg, sum er ein donsk lóg, men Danmark er ikki stýrt eftir føroyskari lóg.

Danmark er heldur ikki føroysk koloni og so framvegis.

So totalt obliviøst bara at føla út í tóman heim soleiðis, at man er jevnbúrdis við danir. Heldur man. Men har sum klárskygni ikki sleppur framat, skulu aðrar kreftir til. Sum ein sum ein dagin helt seg føla, at vit eru ein tjóð. Hvat ST danska stjórnin og grundlógin halda, tað var alt onki í mun til hansara følisir. Ein annar - ein tingmaður við følisum - føldi, at hann átti Danmark minst líka væl sum Danmark átti hann.

Snýr tað seg bara um, hvat man følir í sær sjálvum, haldi eg, at tað er gott at koma í kontakt við sítt innara eg og kanska tí utturu virkuligheitina eisini.

VIÐMERKINGAR

Lønarsteðgur er fupp

Jóannes Jacobsen
Búskaparfrøðingur

Uppskotið um skattalætta afturfyri lønarsteðg byggir á ta grundleggjandi misfatan, at til ber við einum sindri av hokus pokus at "arbeiða rundan um" marknaðarásetingina av prísinum á arbeiðsmegi.

Hvør ásetur tímalønina?

Arbeiðstið er ein vøra, sum verður handlað á einum marknað, sum allar aðrar vørur. Á einum fríum arbeiðsmarknaði er tað kappingarføríð hjá teim ymsu fyritøkunum í landinum mótvegis hvørjum øðrum, sum avger, hvussu býtið av arbeiðsmegini millum tær skal vera. Prísurin á arbeiðsmegini, t.e. lønin, endar so á einum støði, sum ger, at hetta verður býtið av arbeiðsmegini millum fyritøkurnar.

Kjarnin í hesum er, at tað er kappingarføríð hjá teim ymsu fyritøkunum, sum avger, hvat lønin er, ikki øvugt. Hvat ein arbeiðsgevari má gjalda fyri ein arbeiðstíma verður avgjørt av, hvat hinir arbeiðsgevararnir í sínum royndum at fáa fatur í somu arbeiðstímum trýsta prísin á arbeiðstímanum til at vera.

Lønarsteðgur og skattalættar

Higartil hevur almenni politikkurin verið, at arbeiðsmarknaðurin skal virka uttan almenna uppiblanding. Men í løtuni er prísurin á ófaklærdari arbeiðsmegi eitt nógv umtalað evni. Nakrar fyritøkur hava trupult við at klára seg í kappingini um hesa arbeiðsmegina, og hava tær megnað at gjørt tað til eitt samfelagsligt kjakevni. Tað er enntá komið har til, at uppskot er komið frá einum arbeiðarafelag um, at arbeiðarafeløgini skulu ganga við til lønarsteð, um tað almenna afturfyri letur skattalættar.

Men at siga at arbeiðarafeløgini ikki fara at krevja lønarhækkingar, um tey fáa skattalættar, tí so nýtast tey ikki at fáa lønarhækking, er beinleiðis tápuligt. Eingin seljari setur prísin á síni vøru eftir, hvat hann heldur, at hann hevur brúk fyri. Seljarin setur prísin eftir, hvat hann heldur, at hann hevur møguleika at selja vøruna fyri.

Hvat fólk krevja í løn valdast ikki, hvussu nógv tey rinda í skatti, men hvussu nógv, tey halda seg hava møguleika fyri at fáa í løn. So tá samráðingarnar byrja, fara arbeiðarafeløgini at krevja ta lønarhækking, tey halda at arbeiðsgevararnir klára at gjalda, uttan at noyðast at siga fólki upp. Um arbeiðarafjøldin hevur fingið skattalættar frammanundan ella ikki er óviðkomandi.

Lønarsteðgur er óbeinleiðis studningur…

Uppskotið um lønarsteðg er ein roynd at seta ein annars vælvirkandi marknað til viks fyri at framala eitt ávíst býti av arbeiðsgevararnar. Fyritøkur, sum eru í trupulleikum, tí tær ikki klára seg í kappingini um arbeiðsmegina, t.e. serliga nøkur flakavirki, skulu hava óbeinleiðis studning við at prísurin, ið fyritøkurnar skulu gjalda fyri ófaklærda arbeiðsmegi, verður trýstur niður um marknaðarprís. Í veruleikanum er uppskotið um lønarsteðg eitt uppskot um at venda dynamikkinum á arbeiðsmarknaðinum á høvdi. Ístaðin fyri at lata kappingarføri hjá fyritøkunum avgera, hvat lønin er, skal lønin avgera, hvat kappingarføri hjá fyritøkunum er.

…sum ikki verður latin

Trupulleikin fyri tær fyritøkur, sum eftir ætlan skulu hava henda óbeinleiðis stuðulin er, at hinar fyritøkurnar ikki vilja lata hann. Lat okkum sum eitt dømi hugsa okkum, at til næstu lønarsamráðingar verður sáttmálaløna sett til 80 krónur um tíman eftir ynski frá teimum fyritøkum, sum hava trupult við at klára at gjalda verandi tímaløn, hóast rætti marknaðarprísurin er væl hægri. Er tímaløna 80 krónur kunnu hesar fyritøkurnar verða við og keypa fleiri arbeiðstímar.

Men at gjøgnumtvingað eina sáttmálaløn, sum er sett undir tað, ein vælvirkandi marknaður ásetir, hjálpir ikki upp á støðuna hjá fyritøkunum við vánaligum kappingarføri. Kappingarneytarnir hava nevniliga tilskundan til at "snýta".

Fáa fyritøkurnar, sum áður ikki høvdu ráð at keypa arbeiðstímar, fleiri fólk, eru færri fólk til taks at arbeiða fyri aðrar arbeiðsgevarar. Men hesir arbeiðsgevarar hava framvegis brúk fyri fólki, og teir hava ráð at gjalda væl omanfyri 80 krónur um tíman. Tær hava tí tilskundan til at bjóða arbeiðsfólkinum meira enn sáttmálaløna, fyri at fáa ta arbeiðsmegi, teimum tørvar. So stutt eftir er prísurin á eini tímaløn pressaður uppaftur á vanligan marknaðarprís, og fyritøkurnar, sum vóru í trupulleikum, eru líka vítt.

Studning ella ikki

Vilja myndugleikarnir hava, at nakrar ávísar fyritøkur, sum í løtuni ikki klára at vera við í kappingini um arbeiðsmegina, allíkavæl skulu kunna keypa arbeiðstímar, er neyðugt at geva hesum fyritøkum eina hjálpandi hond í kappingini móti hinum fyritøkunum í landinum, sum eisini vilja hava hesa arbeiðsmegi. Tað vil siga at myndugleikarnir noyðast at gjalda ein part av marknaðarprísinum fyri hvønn arbeiðstíma fyri hesar fyritøkurnar.

Vilja myndugleikarnir til dømis avgjørt hava, at eitt ávíst tal av fólki arbeiðir á flakavirkjum heldur enn onkra aðrastaðni, so mugu myndugleikarnir lata flakavirkjum so nógvan studning fyri hvønn arbeiðstíma, at prísurin flakavirkini skulu gjalda fyri hvønn arbeiðstíma júst er soleiðis, at flakavirkini til henda prísin vilja keypa arbeiðsmegina hjá ásetta talinum av fólki.

Fyri at virka má studningur sostatt "snýta" marknaðarprísin. Fyritøkurnar, ið fáa studningin eru betur fyri, men samfelagsbúskapurin sum heild verður verri fyri, tí prísurin ikki longur gevur rætta vitan um samfelagsbúskaparligar fyrimunir og kostnaðir við virksemi á hesum marknaðinum. Hetta hevur beinleiðis vælferðartap við sær og sum fráliður eisini ein verri virkandi búskap, við tað at arbeiðsmegi og kapitalur verða hildin í framleiðslu við minni samfelagsligari virðisøking enn myndugleikir er fyri aðrastaðni. Studningur, beinleiðis ella óbeinleiðis, er tí ein spæliregla, ið politisku myndugleikarnir skulu halda seg burtur frá.

Ikki ein samfelagsbúskaparligur trupulleiki

Skal tað framhaldandi vera so, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir skulu finna útav, hvat býtið av arbeiðstímunum millum fyritøkurnar skal vera, er neyðugt, at myndugleikar eins og partarnir á arbeiðsmarknaðinum vilja góðtaka, at tað altíð vera nakrar fyritøkur, sum ikki kunnu standa seg í kappingini um arbeiðsmegina.

At nakrar fyritøkur ikki klára seg í kappingini um føroysku arbeiðsmegina, tí aðrir arbeiðsgevarar hava møguleika fyri at bjóða meira fyri arbeiðsmegina enn hesar fyritøkurnar, er ikki ein trupulleiki fyri "vinnuna" og tíansheldur ein samfelagsbúskaparligur trupulleiki. Heldur ikki um nakrar av hesum fyritøkum fara á húsagang er hetta ein samfelagsbúskaparligur trupulleiki, tí í einum umskiftandi marknaðarumhvørvi fara fyritøkur á húsagang og nýggjar verða stovnaðar hvønn dag.

Samfelagsbúskaparliga verður hetta bara ein trupulleiki, um fyritøkurnar í trupulleikum klára at sannføra myndugleikar og almenning um, at ein royndeigur at vera gjørd at seta vælvirkandi prísásetingina á tí føroyska arbeiðsmarknaðinum til síðis fyri at hjálpa neyðstøddu fyritøkunum í kappingini móti øllum øðrum føroyskum fyritøkum.

Ongar lappaloysnir, takk

So leingi vit hava nakað sum líkist einum marknaðarbúskapi, fer innanhýsis kappingarføríð millum føroysku arbeiðsgevararnar sostatt at avgera, hvørjar fyritøkur hava ráð til at keypa arbeiðstímar og hvørjar ikki hava ráð. Av tí at hvørki almennir skattalættar ella lønarsteðgur hava nakra ávirkan á innanhýsis kappingarføríð millum føroyskar fyritøkur, so hava hesar lappaloysnir heldur onga ávirkan á prísásetingina á arbeiðsmegi.

Heldur enn at gera sínar trupulleikar til trupulleikar hjá "vinnuni" og samfelagnum og rópa um "loysnir", sum slett ikki eru loysnir, eiga leiðslurnar á fyritøkunum at brúka sína orku til at royna at tillaga virksemið til tær til eina og hvørja tíð galdandi marknaðarumstøðurnar. Tað er hóast alt tað, fyritøkur hava leiðslur til.

Tekst á sjónvarpið

Nicolina Dahl
Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum

Nú valstríðið er í hæddini, sær tað út til, at mesta kjakið snýr seg um, hvussu valsendingarnar í sjónvarpinum spældu av. Við øðrum orðum verður meira tosað um form enn innihald! Tað hevði verið áhugavert at vitað, hvat valevnini í sjónvarpinum søgdu, men vit eru nøkur - umleið tíggjundaparturin av fólkinum í hesum landi, sum ikki eru før fyri at fylgja við í, hvat sagt verður í sjónvarpi, fyri ikki at tala um útvarpi, tí at vit hoyra tað ikki. Tískil kunnu vit, meðan valevnini gera sítt ítarsta fyri at siga okkum, hvat tey meina og meta, vilja og vænta, ætla og lova, noyðast við at sita og hyggja at tí flaksandi upptøkutólinum, meðan vit meta um, hvussu væl (ella illa) slipsini hóska til teir nýggju klædningarnar, og hugleiða um, hvussu tað ber til, at fólk, ið tosa so ótýðiliga, hóast tey í aðramáta mugu sigast at vera dugnalig og professionel, standa fremst innan samskifti og kunning í Føroyum.

Tá løgtingið í næstu viku aftur er mannað við nøkrum av hesum mongu vónríku fólkum, vóna vit, at tey í minsta lagi kunnu semjast um eitt einasta mál: nevniliga tað at áleggja Sjónvarpi Føroya at røkja sína sektorábyrgd yvir fyri teimum mongu, ið ikki hoyra, og teksta allar føroyskar sendingar, sum hava almennan áhuga. Men ikki tykkum at siga, peningur má fylgja við, tí tað kostar at teksta!! Tað hevur vístseg í øðrum londum, at ikki fyrr enn lóg er, ið áleggur miðlunum at teksta, tástani fáa vit hesa tænastu, sum verður mongum til gagns.

So er at vóna, at tá bý- og bygdaráðsvalini verða til heystar, verða eisini vit hoyribrekaðu før fyri at taka lut í kjakinum um innihaldið í tí, landsins kosnu bera fram!

Hví skulu tey børnini ikki hava sama rætt til lívið?

Malena Arnholdsdóttir,
form. í Javna

Børnini, sum hava Down syndrom ella hava sokallaðu Mongolismu.

Eru tey, ið hava Downs syndrom ov góð til at sleppa at liva ella, hví skullu tey skiljast frá - frá sjálvum lívinum?

Tað rann mær kalt niður eftir rygginum, tá ið eg í dag hoyrdi hesi tíðindini.

At danir nú fara at bjóða øllum kvinnum skanning fyri at staðfesta Downs syndrom.

Teir vænta at kunna minka um tilburðirnar úr 60 - 70 um árið til einar 5.

At kanska øllum mammum her skjótt fer at standa í boði at kannast, um barn hennara hevur ein ávísa »nakkafold«. Hevur barnið hesa, skal kannast meira, tí kanska hevur barnið Downs syndrom og, um so er, er best at fáa lívið av tí.

Ja, soleiðis ljóðaði tað fyri mær.

- Hvat munnu tey, ið hava Downs syndrom og avvarðandi teirra hugsa, tá ið tey hoyra slíkt! -

Altso, hvat er hetta fyri nakað?

Skal lívmóðurin, har børnini liggja so trygg, verða eitt ótrygt stað?

Hvat hava tey, ið hava Downs syndrom gjørt okkum?

Hava vit rætt til at nokta teimum lívið?

Hava vit rætt til at nokta foreldrunum hesi børnini?

Hava vit rætt til, at fáa foreldur at føla tað soleiðis, - enntá áðrenn barn teirra er føtt, - tí tað hevur Downs syndrom?

Hvat verður tað næsta, sum er lívsvandamikið at feila - áðrenn ein er føddur?

Ja, eg spyrji bara - tí eg haldi, at øll eiga at hava sama rætt til lívið!

Eri takksom fyri øll míni børn, eisini sonin - við kromosomfeili - sum slapp við lívinum!

Haldi, at vit eiga at taka ímóti øllum børnum við tøkk

Vit mugu hjálpa bæði foreldrum og børnum, at tey fáa eitt virðiligt lív.

Eg ynski við hesum skrivi, at vit øll hugsa meira um, hvat vit halda er rætt ella skeivt og royna at liva eftir tí.

Meira um evni er á heimasíðuni hjá Javna: www.Javni.fo